# Kravfesting til heimasíðu hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni

## 1. Innleiðing

Heilsufrøðiliga starvsstovan er eftirlits- og vitanarstovnurin fyri mat og djór í Føroyum. Arbeiði og kanningar okkara byggja á nýggjastu, altjóða vitan og gransking.

Uppgávurnar hjá stovninum fevna breitt, og eru arbeiðsøkini:

**Matvørur:** Á matvøruøkinum arbeiða vit við at fyribyrgja, at fólk gerast sjúk av mati ella vatni. Stovnurin hevur eftirlit við allari framleiðslu og sølu av matvørum og vatni og ansar eftir, at brúkarar fáa álítandi upplýsingar um matvørur.

**Djóraheilsa:** Á djóraheilsuøkinum verður arbeitt við at fyribyrgja og niðurberja fiska- og djórasjúkur. Arbeitt verður fram ímóti, at framleiðsluumstøðurnar allastaðni eru soleiðis, at djór hava góða heilsu og vælferð við minst møguligari nýtslu av heilivági.

**Veteriner viðurskifti:** Arbeitt verður við veterinerum viðurskiftum og matvørutrygd, soleiðis at føroyskur fiskur, fiskaúrdráttir og aðrar vørur kunnu útflytast og hava atgongd úti í heimi á jøvnum føti við onnur lond.

**Altjóða viðkendar kanningar:** Kanningarstovurnar veita álítandi og altjóða viðurkendar kanningar, sum brúk er fyri í vinnulívi og í samband við eftirlit av øllum slagi.

**Burðardygg alivinna:** Við aliloyvum verður stuðlað undir eina burðardygga, nýhugsandi og kappingarføra vinnu.

Verandi heimasíða, ið sæst á hfs.fo, hevur tørv á munandi dagføringum, serliga í mun til snið, brúkaravinaligheit og leitifunktión. Í tí sambandi verður arbeiðið at gera nýggja heimastovu fyri stovnin boðið út.

Nakrar uppgávur hjá stovninum fevna um almannakunngerð av listum av ymiskum slagi, ið krevja at dátur verða tiknar úr journalskipan hjá stovninum, sí eisini pkt. 2.2.

### 1.1 Málbólkur

Málbólkurin er tvíbýttur.

**Vanligi føroyski brúkarin:** kunning um matvørur, føðslu og dálkingarevni, og kunning um djórahald. Kunning um løggildað matarstøð, almannakunngerð av lúsatølum o.a.

**Vinnan:** upplýsing um krøv til virksemi innan aling, djórahald og innflutning av djórum, matvøruframleiðslu, inn- og útflutning av matvøru, upplýsingar um kanningarstovur, kanningar og sýnisseðlar.

# 2. Innihald

Heimasíðan hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni inniheldur nógva upplýsing og kunning til bæði borgarar og vinnu, sí eisini pkt. 1.1.

Innihaldi á nýggju heimsíðuni verður í stóran mun tað sama, sum á verandi heimasíðu, sí tí eisini hfs.fo.

Verandi innihald skal í mestan mun førast yvir á nýggju heimasíðuna, sum partur av uppgávuni at gera nýggja heimasíðu. Umframt at nakað av nýggjum tilfari verður gjørt og/ella tillagað.

Tó skal tað vera lættari at finna runt í tilfari og ætlanin, er tað tað ikki skal vera eins nógv informatión á pdf-fílum, men heldur at innihaldið skal vera integreraður partur av heimasíðuni.

Stovnurin hevur eisini tríggjar aðrar skipanir/heimasíður, ið lætt skal kunna komast inn á frá hfs.fo. Talan er um:

- Brá.fo (málbólkur, vanligi borgarin)
- Aliskipanina (málbólkur, alivinnan)
- Labvantage (málbólkur, kundar hjá kanningarstovunum)

## 2.1 Leiting

Heimasíðan skal hava eina vælvirkandi, nýmótans og vælskipaða leitifunktión, ið ger tað lætt at finna tað, ein hevur brúk fyri, uttan neyðturviliga at vita hvørjir vegir og snarvegir leiða til tilfarið.

- Leitingin skal kunna tolerera smærri villur t.d. Petur ístaðin fyri Pætur osv.
- Tað skal bera til at leita í tilfari á heimasíðuni og í fílum á heimasíðuni.
- Leitifunkan er snild og kemur við uppskotum, so hvørt tú skrivar ein bókstav í leititeigin

Hetta verður mett sum ein avgerandi parametur í heimasíðuni, og tí er tað ein fyrimunur um tilboðsveitari hevur lýst væl, hvussu hendan verður uppbygd, hvussu sorteringin í leitiúrslitum verður gjørt osv., og hvørjir fyrimunar og vansar eru við møguligari loysn.

## 2.2 Integratión av data og listaføring

Heilsufrøðiliga starvsstovan førir listar, ið sambært lóg skulu vera tøkir hjá almenninginum. Umframt at aðrir listar, ið ikki eru lógarkrav eru at finna á heimasíðuni.

Talan er um:

- Landalistar (hvørji virki og skip kunnu útflyta til hvørji lond)
- Listar yvir løggildar og skrásettar matframleiðarar
- Heimaframleiðarar
- Alifirðir
- Aliloyvi
- Laksalús
- Medisinskar viðgerðir av alilaksi

Fleiri yvirlit og listar eru bygdir á dátur, sum skulu takast úr journalskipanini hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Dømi, landalistar: [https://hfs.fo/webcenter/portal/HFS/pages_fodslutalva/page16?Adf-Window-Id=w1ivwwhmj0&Adf-Page-Id=1](https://hfs.fo/webcenter/portal/HFS/pages_fodslutalva/page16?Adf-Window-Id=w1ivwwhmj0&Adf-Page-Id=1)

Samlaði listin, yvir virki (matvørur og ikki matvørur) ið kunnu útflyta til EU og 3. lond, ið krevja v

| AUT. NO | NAVN | SLAG | ES | RUSSLAND | KINA | VIETNAM | BRASILIA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| FO 125 | Bakkafrost Processing, Glyvrar | PPA | ES | | Kina | Vietnam | Brasilia |
| FO 189 | Bakkafrost Processing, Vágur | PPA | ES | | Kina | Vietnam | Brasilia |
| FO 292 | Barðið, landingarmiðstøðin í Tórshavn (íroknað ísvirkið) | PP | ES | | | | |
| FO 113 | Bátafiskur, Eiði | PP | ES | | | | |
| FO 270 | Defa, Vágur | CS | ES | Russland | | | |
| FO 186 | Delta Seafood, Tvøroyri | PP | ES | | | | Brasilia |
| FO 298 | FD 10 Akraberg, OW2087 | FV | ES | | Kina | Vietnam | Brasilia |
| FO 291 | FD 32 Stapin OW2065 | ZV | ES | | Kina | | Brasilia |
| FO 339 | FD 454 Kambur OW 2040 | ZV | ES | | Kina | | Brasilia |

Yvirskipað, skulu dáturnar trekkjast úr skjalahaldi til JASON fílur, ið tit fáa atgongd til. Dáturnar verða lagdar á millumservara, og haðani kann heimasíðan fáa atgongd til dáturnar. Forskjótingin verður á leið ein dag.

Heimasíðan skal ikki viðføra at forskjótingin gerst nevnivert longur, enn seinkingin, sum verður vegna úttrekkið frá Skjalahaldi til JASON fílu.

Eisini eru hagtøl, ið skulu fáast úr Aliskipanini, ið er skipan har alarar skulu skrásetta viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri alingina og eftirlit av aling. Hesar dátur verða latnar við at heimasíðan sendur fyrispurning beinleiðis til Aliskipanina, ið liggur á Landsneti. GG. Aliskipanin krevur at tann í skal hava atgongd til skipanina er staðsettur í Føroyum.

Dømi, lúsatøl: [https://www.hfs.fo/webcenter/portal/HFS/pages_aling/hagtl/lsatl](https://www.hfs.fo/webcenter/portal/HFS/pages_aling/hagtl/lsatl)

Aling lúsatøl

Flyt út til Excel

dd/mm/yyyy

| VAKSNAR KVENNLÝS | AS-NUMMAR | ALIØKI | ALISTAÐ | LOYVISHAVARI | DAGFESTING FYRI TELJING |
|---|---|---|---|---|---|
| 0.33 | AS-10 | A-52 | Oyndarfjørður inni á fjørð | Mowi P/F | 27/05/2026 |
| 0.19 | AS-19 | A-15 | Froðba | Bakkafrost Farming P/F | 27/05/2026 |
| 0.16 | AS-22 | A-04 | Lambavík | Bakkafrost Farming P/F | 27/05/2026 |
| 0.44 | AS-21 | A-12 | Kunoyarnes | Bakkafrost Farming P/F | 27/05/2026 |
| 0.27 | AS-05 | A-92 | Vágur | Bakkafrost Farming P/F | 27/05/2026 |
| 0.19 | AS-03 | A-27 | Miðvágur | Luna P/F | 27/05/2026 |
| 0.38 | AS-23 | A-13 | Borðoyarvík | Bakkafrost Farming P/F | 26/05/2026 |
| 0.02 | AS-06 | A-71 | Funningsfjørður Líðin | Bakkafrost Farming P/F | 26/05/2026 |
| 0.02 | AS-31 | A-90 | Sandsvág | Mowi P/F | 26/05/2026 |

Tað skal vera gjørligt at sortera og leita í listum og dátum.

Tørvur kann vera á, at dátur (t.d. lúsatøl) verða vístar í grafum, eins og hesi dømi av heimasíðuni hjá Hagstovuni og Havstovuni:







Hagstova.fo



Hav.fo

Loysn, so hetta kann gerast, annaðhvørt sum partur av CMS ella umvegis t.d. powerBI sum síðan verður víst á heimasíðuni, skal vera.

Kunnandi tilfar til brúkarar og og vinnu er ikki knýtt at journalskipanini, men er tilfar sum verður gjørt til heimasíðuna. Í hesum tilfari skal vera lætt at rætta, strika og leggja afturat.

## 3. Krøv

| | Snið, stílur og UX |
|---|---|
| Snið og bygnaður | Snið skal vera einfalt, og lætt at finna runt í. Tað skal vera brúkaravinarligt, hvussu ein finnur fram til tað tilfar ein ynskir.<br><br>Uppskot til layout og uppbygna av heimasíðuni o.tíl skal vera partur av tilboðnum. Sniðuppskot skulu í minsta lagi fevna um høvuðssíðu v. tíðindum/aktuellum, og tað, ið er lýst undir innihald: kunningarsíður, talvur og grafar.<br><br>Tá ein veitari er funnin verður heimasíðan endaliga ment í samstarvi millum Heilsufrøðiligu starvsstovuna og veitaran.<br><br>Vit skulu sjálvi lættliga kunna broyta í kunning o.tíl, bæði í inndeiling av yvirskriftum/síðum og sjálvum tekstinum.<br><br>Líknandi heimasíður eru heimasíður hjá øðrum norðurlendskum matvøru og veterinermynduleikum. Dømini um líknandi heimasíður skulu ikki skiljast sum ítøkilig sniðgevingaruppskot, men eru tikin við fyri at vísa á aðrar líknandi heimasíður hjá tilsvarandi norðurlendskum mynduleikum, við líknandi leiting og har tað eru nógv ymisk evni, ið eru á heimasíðuni, og har málbólkur bæði er borgari og vinna:<br><br>NO - mattilsynet: www.mattilsynet.no<br>DK – fødevarestyrelsen: www.foedevarestyrelsen.dk<br>SE - livsmedelsverket: www.livsmedelsverket.se |
| Responsivt snið | Heimasíðan skal lagar seg til eindina, har hon verður víst. |
| Samleiki | Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur búmerki, og litir og skrifttypur, ið eru knýttir at samleikanum. Valda snið og litir til heimasíðuna skulu hóska væl saman við hesum.<br>Sniðhondbók kann útflýggjast til veitar, um ynski er um tað. |
| Sjónlig leitifunka | Leitifunkan eri ein umráðandi partur av heimasíðuni og skal vera sjónlig og á øllum síðum. Sí pkt. 2.1. |
| Accessibility | Atlit skulu takast til serligan tørv, og heimasíðan skal vera brúkaravinalig eisini fyri sjón- og hoyriveik. Forrit sum Readspeaker, skulu tí kunnu knýtast til heimasíðuna. Skal liva upp til EU-direktiv um atkomuligheit |
| Fleiri tungumál | Møguleiki skal vera fyri at hava hjásíður á øðrum tungumálum, t.d. enskt. |
| Annað | Heimasíðan skal ikki innihalda logo, navn ella annað, hjá øðrum enn Heilsufrøðiligu starvsstovuni, uttan tá tað er ítøkiliga avtalað við stovnin. |

| | Teknisk krøv |
|---|---|
| Kagar | Heimasíðan skal virka fullvæl á øllum teimum vanligu kagunum, so sum: Firefox, Chrom, Safari, Edge |
| Performance | Yvirornaða performance av heimasíðuni er góð, og síðan reagerar skjótt uppá brúkara-interaktiónir. Innihald verður innlisið og víst á heimasíðuni innan 3 sekund. |
| Ritbúnaður | Vit ynskja eina roynda CMS-skipan við góðum ummælum, ið er løtt at brúka. |
| Umsiting av heimasíðu og login | Brúkarar (login) skulu vera active directory brúkararnir, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur umvegis landsnet.<br><br>Tað skal einans bera til at logga inn á heimasíðuna, tá ein er á landsnet og á Føroyskari IP adressu.<br><br>Møguleiki skal vera at avmarka atgongdina hjá ritsjórunum, so ritsjórin bert sær tað, ið viðkomandi hevur fingið atgongd til.<br><br>Atgongd til dátur, ið koma frá øðrum skipanum (Skjalahald og Aliskipan, sí pkt. 2.2), skal einans liggja hjá brúkarum, ið hava hægstu atgongd (admin).<br><br>Heimasíðan skal verða einføld og intuitiv at umsita. Ofta verða tekstir skrivaðir í øðrum forritum sum word, pages, outlook ella øðrum fyrst og tað skal vera einfalt at copy/paste inn í heimasíðuskipanina uttan at fontar o.a. fara út av lagi.<br><br>Skipanin gevur boð, tá ein handling er gjørd (t.d. at ein tekstur er goyndur og publiseraður). Eisini er umráðandi við WYSIWYG-editor umframt møguliga at reinsa formatión<br><br>Møguleiki skal vera fyri at tíðaráseta nær tilfar verður alment. |
| Vegleiðing og undirvísing | Við í loysnini er vegleiðing og undirvísing av umsitarum av heimasíðuni. |
| Myndir | Heimasíðuskipanin skal hava møguleika fyri sjálvvirkandi skering av myndum. Støddin á myndunum skal tillagast av sær sjálvum, so ferðin á síðuni er sum frægast. Umsitari skal kunna velja fokuspunkt á myndini. |
| Integratión av data | Heimasíðan skal kunna integrera dátur úr journalskipanini hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni umvegis JASON fílur á millumservara og við fyrispurningi til Aliskipanina, sí pkt. 2.2. |
| Sortering og leiting í listum/dátum | Tað skal bera til at leita og sortera í listum/dátum á heimasíðuni, sí pkt. 2.2. |
| Integratión við PowerBI | Heimasíðan skal kunna integrerað grafar og líknandi úr powerBI |
| Kort | Upplýsingarnir úr 360 og Aliskipan skulu kunnu vísast fram á einari grafiskari loysn við Føroyakorti (dømi: aktuell lúsatøl og alifirðir) |

| | |
|---|---|
| Síðuvísingar tvørtur um síður | Innihaldið skal kunna vísast tvørtur um ymsu síðurnar - dømi tíðindi á undirsíðum |
| Prenta tilfar frá síðuni | Brúkarin skal hava møguleika at prenta tilfar frá heimasíðuni í snøggum formati. |
| Talgild oyðubløð | Møguleiki skal vera fyri skipan við talgildum oyðibløðum/formularum, ið kunnu latast inn umvegis heimasíðuna. Oyðubløð er m.a. umsóknir um løggilding, innflutning av djórum og sýnisseðlar, og verða brúk av bæði vinnu og borgarum.<br><br>Formularar skulu kunnu tillagast eftir tørvi, og tað skal kunna vera gjørligt, at umsóknir skulu váttast við telefonnr (ella líknandi loysn).<br><br>Útfyltir formularar skulu kunna koyrast í SQL databasa.<br><br>Uppá sikt skal tað vera gjørligt við integratión við Samleikan. |
| Gjalda rokningar | Vit ynskja at vita hvat skal til fyri at gjalda rokningar við gjaldskortið á heimasíðuni, og hvat kostnaðurin er fyri hetta. Møguliga verður hetta ikki tikið við beinanvegin, men skal vera ein menningarmøguleiki. |
| SoMe | Heimasíðan skal kunna leinkja væl til Facebook, Instagram og aðrar sosialar miðlar. Heimasíðan skal kunna vísa Youtube-klipp. Tá brúkarin deilir síðu frá heimasíðuni fylgir mynd og tekstbrot við. |
| Kjatt-funka | Heimasíðan skal hava møguleika fyri A.I kjattbotti, um tørvur og ynski verður á tí frameftir. Ætlanin er at hesin kann svara einføldum spurningum um t.d. krav loyvir til innflutning av kelidjórum, hvat skal til fyri at fá løggilding osv. Skal verða grundað á (LLM) og skilja føroyskt. Eins og t.d. EyðEi hjá Taks. Hetta verður ikki beinanveg, men skal vera ein menningarmøguleiki. |
| Hagtøl um vitjandi | Vit ynskja eina einfalda skipan til at síggja hagtøl fyri brúkaratburðin hjá vitjandi á heimasíðuni. Hetta uttan at innsavna persónligar upplýsingar ella persónligt eyðmerkjandi upplýsingar (PII), og uttan at brúka 'Cookies'. |
| Subdirectory | Vit skulu kunna gera subdirectory (slug) til ymiskar síður, har tað er mett neyðugt. Subdirectory (slug) til høvðussíður skulu vera stutt. |
| Yvirlit yvir óvirknar leinkjur | Umsitarin skal hava møguleika at fáa boð um, tá leinkjur eru óvirknar |

| | Hýsing, trygd og lógarkrøv |
|---|---|
| GDPR og onnur lógarkrøv | Heimasíðan skal yvirhalda GDPR-krøv |
| Hýsing og integratión av dátum. | Hýsingin skal vera í Føroyum, og verða stýrd av Landsnet.<br><br>Dáturnar koma úr journalskipanini hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni umvegis JASON fílu og við atgongd til dátur úr Aliskipani. Dátur skulu liggja á tryggum millumservara (DMZ sonu) veittum av Landsneti. |
| Avtaluviðurskifti | SLA avtala við veitara skal sambært rundskriv hjá KT Landsins um trygd á heimasíðum, í minsta lagi innihalda og/ella lýsa:<br>- Penetrationtest<br>- Backup |

| | |
|---|---|
| | - Restore/revovery test<br>- Fysiska trygd<br>- Logiska trygd<br>- Yvirvaking<br>- Reaktiónstíð hjá veitara<br>- Trygdardagføringarog patching<br>- Veitingartrygd (køling/streym)<br>- Change Management<br>- Hendingaloggar, administratorloggar<br>- Verju móti álopum<br>- Uppitíð<br>- Trygdarváttan |

# 4. Krøv til tilboð

| | Tilboð og meting av tilboð |
|---|---|
| Krøv til tilboð | Tilboð frá veitarum skal innihalda:<br>- Dømir um snið<br>- Lýsing av leitifunktión (sí pk.t 2.1)<br>- Val av CMS, og lýsing av dataintegratión (sí pkt. 2.2)<br>- Lýsing av verkætlanargongdini, íroknað útvikling av snið<br>- Referansur til líknandi arbeiði<br>- Kostnaðaryvirlit<br>- Tímaprís fyri víðari menning av heimasíðuni, út yvir innihald í tilboði, komandi árið.<br><br>Tað er eitt ófrávíkiligt krav at heimasíðan verður í hýst hjá Landsneti og at dátur liggja á tryggum millumservara sum Landsnet administerar. |
| Meting av tilboð | Heilsufrøðiliga starvsstovan metur um tilboð út frá hesum viðurskiftum:<br><br>50% Góðska, herundir<br>- Layout og brúkaravinaligheit<br>- Leitifunktión, ið lýkur ásetingar í 2.1.<br>- Fakligur førleiki hjá tilboðsveitara (t.d. referansur og CV fyri starvsfólk á projekti)<br><br>50 % Kostnaður<br><br>Tíðarætlan. Heilsufrøðiliga starvsstovan væntar, at nógv av arbeiðinum verður gjørt í ár og fyrst í komandi ári.<br><br>Fyri at tryggja eitt gott nøktandi støði verður ásettur ein minstiprísur á 150.000 kr. |

| | |
|---|---|
| | Heilsufrøðiliga starvsstovan tilskilar sær rætt til, ikki at taka av nøkrum tilboði. |
| Tíðarætlan fyri útboð | Tíðarætlan fyri útboð:<br><br>**Vika 25.** Útboðið tøkt á útboðsportalinum seinast 26. juni 2026<br>**Vika 26 til 34**. Veitarar spyrja um ivamál. Freist at spyrja er 20. august 2026. Svartíðin verður ávirka av summarferiu, men øll svar verða løgd út á keypsportal (anonymiserað) í seinasta lagi 21. august, um tað ikki ber til at leggja tey út so hvørt.<br>**Vika 36**. Tann 31. august kl. 12 er freist at lata inn tilboð<br>**Vika 36 og 37** Viðgerð av tilboðunum<br>**Vika 38**. Heilsufrøðiliga starvsstovan tekur avgerð og fráboðan verður send veitarunum tann 15. septembur. |